**Tíðindabræv 19/2014 – Rakstur**

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

September 2014

## IMO: Dagført rundskriv nr. 3485 frá IMO um Ebola-smittuna

Hjálagda skriv frá IMO skal lesast saman við rundskrivi nr. 3484 frá 2. sept. 2014 um Ebolasmittuna. Sí okkarar tíðindabræv nr. 18/2014 – Rakstur.

Nýggja skrivið vísir til stig, ið kunnu takast í samsvarið við SOLAS kap. XI-2 og ISPS-reglugerðina, sum er skilagóð beinagrind, tá ið ræður um forðandi/fyribyrgjandi tiltøk, til tess at verja fólk umborð á skipum ella tey, sum arbeiða í havnum ímót hóttanum uttaneftir.

Hóast sett í gildi av øðrum ávum, kann nærløgd nýtsla av ISPS-reglugerðini eisini vera til hjálpar í slíkum førum sum hesum, fyri at forða fyri, at smittan sleppur umborð á skipið.

Sambært áheitan frá IMO skal Sjóvinnustýrið so statt gera vart við tann ágóða, sum fæst við at seta ISPS-reglur í gildi umborð í økjum, har vandi fyri Ebolasmittu er. Samstundis sum víst verður til leiðbeiningina frá Alheimsheilsustovninum WHO (sí IMO rundskriv 3484).

Sjóvinnustýrið mælir eisini til, at fylgt verður við á heimasíðunum hjá IMO á

- http://www.imo.org/MediaCentre/HotTopics/ebola/Pages/default.aspx

Hjálagt: IMO Circular Letter 3485

--- 00 ---